## Real Madrid betrar marknaðin

Mark Hughes, sum er manager hjá Manchester City, er ósamdur í, at tað er ósunt fyri fótbóltin, at Real Madrid nú í eina viku hevur goldið tilsamans 1,2 milliardir fyri Kaká og Ronaldo. – Tað kann væl stimulerað marknaðin. Hetta setir nógvar pengar í umferð, so marknaðurin verður helst meira áhugaverdur nú, sigur Mark Hughes.



## Platini ræðist Real

UEFA-forsetin, Michel Platini, heldur tað vera púrasta burturvið, at Real Madrid hevur rindað ovurhonds stórar upphæddir fyri Kaká og ætlandi eisini Ronaldo. – Hesir handlarnir eru ein beinleiðis avbjóðing til ætlan okkara um fair-play og fíggjarliga javnvág í fótbóltinum. Og í UEFA arbeiða vit hart við at fáa nýggjar lógir, soleiðis at marknaðurin aftur verður gjøgnumskygdur, sigur Michel Platini við Sportinglife.

# og bjarnaveiðu




*Sámal Joensen var einasti spælarin sum veruliga hevði støddina at bjóða russum av kropsliga. Og bæði í verju- og álopsspælinum kom hetta væl við hjá føroyska liðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

eftir steðgin.

Hjá føroysku spælarunum var orkan eisini spakuliga við at ganga undan. Føroyska kappingin er langt ífrá í hæddini júst nú, og tí kundi dystarvenjingin sjálvandi verið betri. Og tá mótstøðan so eisini telur fleiri mans, sum liggja tyngru megin tey 100 kilo'ini, so kostar tað altso rættiliga nógvar kreftir at berjast í nærdystum.

Og so fingu vit altso eisini at síggja, hvussu framúr góðir hondbóltsspælarar stóru bamsurnar eisini vóru. Tað kann væl vera, at russiska liðið ikki taldi allar sínar sterkastu profilar á degnum. Men minni kundi so væl og virðiliga eisini gera tað móti føroysku spælarunum, sum – hóast óimponeraðir – ikki veruliga kundu spæla við alla tíðina.

### Tveir dagar til hvíld

Longu leygardagin skal føroyska liðið aftur í eldin, tá Italia stendur fyri framman.

Undan kappingini varð sagt, at hetta var eitt av liðunum, har okkara veruliga hevði ein møguleika, og hóast talan gjørdist um greitt tap á Sicilia í útidystinum, so sýndi sami dystur eisini, at okkara á einum góðum degi væl kunnu skaka italska liðið.

Í so máta var tað sera hugagóð staðfesting hóskvøldið, at talið av tekniskum mistøkum var at kalla minimerað. Kann føroyska liðið spæla nakað av tí, sum liðið sýndi fyri steðgin móti russum, og heldur venjingarstøðan – nú heimliga kappingin liggur still – til tveir landsdystir upp á tríggjar dagar, so kann tað væl henda seg, at leygardagurin verður ein av teimum heilt hugaligu hjá føroyskum hondbóltsfjepparum.



*Mistøkini vóru at kalla eingi, og tað gav russum fáar møguleikar til skjótálop fyri steðgin, helt Esbern Paturson aftan á dystin hóskvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Gevur gott mót

**Esbern Patursson helt eftir dys tin, at føroyska spælið í fyrra hálvleiki gav góðir vónir til dystin móti Italia leygardagin**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Esbern Patursson staðfesti eftir dystin hóskvøldið, at føroyska spælið riggaði sera væl fyri steðgin.

- Vit spæla kanska eitt sindur yvir evni fyrsta hálva tíman. Vit spæla øgiliga væl, og vit gera at kalla eingi teknisk mistøk. Tað at vit bara hava Sámal, sum veruliga kann skjóta útifrá, ger kanska eisini, at vit alla tíðina leggja dentin á at spæla okkum ígjøgnum. Tí verða tað fá álop, sum verða avsluttað við 50%-kjansum, og tað er sjávlandi ein fyrimunur.

- Og í seinna hálvleiki spæla vit ikki líka væl. Eg haldi ikki tað er tað, at teir spæla so nógv betur tá.

Næsta uppgávan eitur Italia. Um tit megna at halda fast um spælið frá fyrra hálvleiki í dag. Hava tit so møguleikan at skapa eitt úrslit í tí dystinum?

- Tað hava vit avgjørt. Og ætlanin hjá okkum er í øllum førum at halda fast í tí, sum vit gjørdu fyrra hálvleik í dag, sigur Esbern Patursson.